## FCK úr Parkini

**Við at megna javnleik í seinnu hálvfinaluni syrgdi Brøndby fyri, at tað verða teir og ikki FCK, sum verða mótstøðulið hjá FCM í steypafinaluni**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsfepurin í danska høvuðsstaðnum er størri, enn hann hevur verið í ógvuliga mong ár. Brøndby og FCK hava stríðst fleiri ferðir nú í vár, og áskoðarafjøldin er stór hvørja einastu ferð. Mikukvøldið var seinna hálvfinalan í steypakappingini á skránni, og 25 túsund møttu upp í Parkini.

Útgangsstøðan hjá Brøndby var 1-0 sigurin frá uppgerðini í Brøndby. Tann sigurin var hentur hjá teimum gulu og bláu at hava í viðførinum. Úrslitið mikukvøldið var 2-2. Brøndby var frammanfyri 1-0 og 2-1. Harvið rann FCK støðugt aftaná.

Talan var um sera tætta og spennandi uppgerð. Álvaro Santos stútaði FCK upp á 1-1, eftir at Zuma hevði lagt snildisliga innfyri, og útjavnandi málið til 2-2 var framúr langskot úr vinstru hjá Janne Saarinen. Morten Skoubo legði Brøndby framum fyrru ferðina, og Thomas Kahlenberg skoraði seinna Brøndby málið.

Eingin spenningur var, tá ið FC Midtjylland fyri 20. ferð átti heimavøll á nýggja stadion í Herning. FCM hevði vunnið 4-0 í Horsens, og enn eina ferð eydnaðist tað teimum at fara av heimavøllinum uttan at hava tapt. FCM vann 1-0 og samantalt 5-0. Danska steypafinalan verður millum nummar eitt í landskappingini, Brøndby, og nummar trý, FCM, í Parkini Kristi himmalsferðardag.

# Áðrenn Immola




**Hetta vikuskiftið er 25 ferð at koyrt verður formel 1 á Immola breytini**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*

Immola breytin liggur í Ferrari landi, stutt frá Maranello høvuðstøðini hjá Ferrari. Hendan breytin er tiltikin fyri at nógvir Ferrari fjepparar sokallaðir Tifosi koma til koyringina. Immola liggur í Italia, men er tó tann almenna San Marino koyringin. Hetta tykist kanska eitt sindur løgið, men Italia hevur longu eina formel 1 koyring í Monza, og eitt land kann ikki hava meira enn eina almenna koyring. So við at umdoypa koyringina til almennu San Marino koyringina slepst undan trupulleikum.

Immola gjørdist í 1994 karmur um eitt tað syrgiligasta vikuskiftið í formel 1 søguni. Fríggjamorgun, koyrdi Rubens Barrichello við nógvari ferð á. Hann lá í koma fyrstu tíðina, men slapp undan varandi mein. Leygardag doyði ungi eysturríski koyrarin Roland Ratzenberger og sunnudag doyði brasiliumaðurin Ayrton Senna. Ayrton Senna, var ein tann dugnaligasti formel 1 koyrarin nakrantíð, og Immola breytin fer altíð at verða samantvinna við hansara navn. Breytin er umbygd eitt sindur síðan 1994 og vandamikla svingið Tamburello, har Senna doyði, er ikki longur líka vandamikið.

Skála-VB:

# Bara eitt mál hvørja ferð

**Vágbingar leita eftir málunum, og á Skála skulu nýggju menninir fyri fyrstu ferð royna seg á heimavølli**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Vágbingar hava trupulleikar við at gera mál. Tað vísir støðutalvan, og tað ásannaði venjarin, John Christensen, eftir tepra tapið á heimavølli móti GÍ.

– Vit nýta teir spælararnar, sum vit hava. Teir hava áður víst, at teir duga at gera mál. Vit arbeiða við søkini, og eg vóni og havi álit á, at tað fer at gleppa, sigur VB venjarin.

At vágbingar kunnu vera stinnir á útivølli sást í Klaksvík, har teir megnaðu at verja tepra leiðslu inntil lítla løtu undan dystarenda, tá ið KÍ skoraði við brotssparki. Tað er neyvan nakar ivi um, at taktikkurin hjá VB hesa ferð fer at minna nógv um tann, sum teir nýttu ta ferðina.

Á Skála er lagið gott. 2-0 sigurin í Klaksvík bar oddasessin við sær. Hann tók HB mikukvøldið, men teir læna hann bara inntil sunnudagin, tá ið Skála aftur kann leggja seg á toppin.

– Tað ræður um at fáa hugsanirnar frá sigrinum í Klaksvík og snaraðar til avbjóðingina sunnudagin, verður sagt av Skála. Sunnudagin hava nýggju útlendingarnir fyri fyrstu ferð møguleikan at spæla á heimavølli.

Vongverjin, Bárður Danielsen, varð skaddur undir upphitingini í Klaksvík, og tað varð í gjár ikki mett serliga sannlíkt, at hann verður tøkur sunnudagin.

Skála og VB hava spælt tríggjar ferðir í landskappingini á Skála, og tað er synd at siga, at talan hevur verið um málríkar uppgerðir. Í 2002 vann VB 1-0, og tvær tær síðstu ferðirnar hava skálamenn vunnið 1-0.

# Hálvfinalurnar á skránni

**Leygardagin fara AB og B71 og LÍF og B68 undir telvingina um, hvør skal verða partur av finaluni í lítlu steypakappingini**

FSF STEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Nú fer at nærkast, at sjøtul fer at verða settur á landskappingina í næstbestu deildini. Annan leygardag, 30. apríl, verður fyrsta umfarið.

2. deildar feløgini hava fingið dystarvenjing í kappingini um FSF steypið ella í lítlu steypa-kappingini, sum hon varð nevnd longu í fjør, tá ið hon var fyrstu ferð á skránni, og B71 vann hana.

Nú er komið fram til hálvfinaluumfarið. Fyrru dystirnir verða spældir nú leygardagin. Tá skulu LÍF og B68 spæla í Leirvík, og AB og B71 skulu spæla á Argjum. Seinnu hálvfinalurnar skulu sambært skránni spælast 2. hvítusunnudag, sum er 16. mai.

Finalan verður leygardagin 2. juli ella leygardagin eftir at 2. deild verður farin í summarfrí.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við
www.sosialurin.fo